# Avtakið skattalættan fyri 2008

Undirritaðu feløg heita á løgtingið um at stuðla uppskotinum um at avtaka skattalættan fyri 2008.

Skattalættin er sosialt órættvísur og økir ferðina á føroyska búskapin.

Feløgini harmast um skattapolitikkin hjá sitandi samgongu, sum økir um gjónna millum hág- og láglønt.

Ein persónur við fullari arbeiðaraløn á 207.000 kr fær sambært skattalóg hjá samgonguni einar 700 kr í skattalætta í 2008 meðan ein persónur, ið forvinnur tað dupulta, fær 6000 kr í skattalætta eftir at samhaldsfasti er rindaður.

Feløgini meta, at peningurin heldur skal nýtast til at dagføra vælferðartænastur. Tørvur er m. a. á at betra fólkaskúlan, dagføra almanna veitingar/pensjónir ella at gera bústaðir fyri ávísar samfelagsbólkar.

Búskaparliga er tíðin ikki tann rætta at veita skattalættar.

Skal skattalætti gevast má hesin minka um vaksandi gjónna í samfelagnum. Feløgini vísa tí til uppskotið frá fakfeløgunum í desember 2006.

At enda vilja feløgini heita á løgtingið um at útgreina viðurskiftini hjá ymisku samfelagsbólkunum í Føroyum. Í løtuni er alt ov lítil vitan um sosial viðurskifti her á landi.

Vinarliga,

**Føroya Arbeiðarafelag**
**Havnar Arbeiðskvinnufelag**
**Havnar Arbeiðsmannafelag**
**Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag**
**Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag**

# Strámannafall

Hjalmar N. Poulsen



Við brestin og sum døgg fyri sól hvurvu 200 væla arbeiðspláss. Hetta kunnu vit takka yvasomu fiskivinnuumsitingini og føroysku strámannavirkseminum fyri. Lat ongan iva vera um tað. Og so er tað sagt.

Ryggurin aftan fyri strámannavirkseminum hjá JFK-Trol, er sambart Hanusi Hansen sjálvum í føroysku fjølmiðlum, rætt og slætt ongin. Hanus er erligur og viðgongur alment, at eginkapitalur felagsins er í lummanum hjá "Røkke". Hann sigur víðari, at um teir muta ímóti, ja so "klemmar" stóribeiggin skrúvuna og koyrir strámannin umkoll. Og tað má ikki henda, tí so missa vit feitu strámannalønirnar.

Hóast føroysku skattakrónurnar inntil víðari eru mistar, er skilabetri at senda tey 200 fólkini inn á ALS eftir sosiala kekkinum.

Ikki er altíð nemt at skylda upp á hvønn annan. Í stóran mun kemur tað júst til sjóndar her. Í øllum hesum heimildarruðuleikanum, ryggleysum strámonnum og fíggjarpolitiskum hurluvasa, kann staðfestast, at føroyski almenningurin enn einaferð er við sviðusoð.

Men sjón gongur nú fyri søgn, at útlendski kapitalurin í allarhægsta grad stýrir føroyskum vinnuvirksemi. Tað mann følast óunniligt í Fiskivinnuumsitingini í hesu stund. At hetta kundi henda, vistu teir væl av frammanundan. Teir hava sjálvir biðið um tað og liggja nú sum teir hava reitt. Eftir stendur so spurningurin um fiskirættindini, sum er ogn Føroya fólks. Eru tey nú tað? Um ja, so inndragið tey aftur sum skjótast, so breyð aftur fæst á borið, har strámaðurin ikki skal fáa seg mettan.

Vestmanna hin 21.3-07

# Alfred Olsen og Jóhan Dahl

ÓLAVUR PETERSEN
ois@petersen.mail.dk

Tá Jóhan Dahl bjóðaði Kaj Leo Johannesen av um formanssessin í Sambandsflokkinum, skrivaði Dimma í leiðara sínum, at um Jóhan verður formaður, so fær Sambandsflokkurin ikki arbeiðsnáðir at føra politik, tí hansara døkka fortíð fer at verða drigin fram í ljósmála hvørja ferð avgerandi politiskar avgerðir skulu takast.

Nú Jóhan Dahl stillar upp sum næstformaður í flokkinum skyldar blaðstjórn Dimmalættingar føroyska fólkinum, og ikki minst limum Sambandsfloksins, hvørja vitan Dimma hevur um fortíð Jóhan Dahls, sum ger, at hann heldur ikki skal veljast í næstformanssessin í flokkinum.

Tað sum órógvar allarmest er tann kuldi og kynisma, sum hevur tikið valdið í Sambandsflokkinum.

Sum skilst verður Alfred Olsen ikki lagdur á vektskálina á landsfundinum í Sambandsflokkinum komandi vikuskifti vegna tvørrandi politiskan førleika, men av teim avleiðingum, sum persónurin Alfred mátti taka í sambandi við løgtingsviðtøkuna av broytingum í revsilógini, sum stríddu so harðliga móti tí grundstøði, sum hann hevur bygt sítt lív á.

Eg fari at minna landsfundin hjá Sambandsflokkinum á, at tað er Alfred Olsen fyri Sambandsflokkin sum eigur undirskrivtina sum er grundarlagið fyri, hvat henda samgongan hevur sett sær fyri at røkka.

Tað fer at pína Alfred restina av hansara lívi, at ein løgtingssamgonga sum hann hevur fingið upp at standa, er farin inn á umráði, sum hjá honum er alveldi, sum hann og lóggávuvaldið einki hava við at gera. Út frá hesum skal hansara avgerð skiljast, og tað er einki sum forðar honum at vera eins góður ella vánaligur næstformaður sum undan atkvøðugreiðsluna um revsilógina.

Tvørturímóti fer hann nú, uttan nevndarsessir, at hava nógv betri tíð at røkja sínar leiðsluuppgávur.

Sambandsflokkurin sigur seg hava fríttstillað sínar limir í etiskum spurningum.

Spennandi at síggja um hægsti myndugleiki Sambandsfloksins, aðalfundurin, fer at fáa meiriluta fyri at einki etiskt/moralskt mark er fyri, hvør ið settur verður í Sambandsfloksins leiðslu og harvið er valevni til landsins hægstu politisku umsiting.

Jóhan Dahl sigur Kaj Leo Johannesen hava brúk fyri einum góðum bakki, - til hetta verjuspælið bjóðar hann seg fram til.

Ein kreativur miðvallarspælari hjá Tjóðveldisflokkinum spældi herfyri ein bólt fram í verjuna hjá Sambandsflokkinum.

Teir kulturradikalu í miðverjuni hjá Sambandsflokkinum lótu bóltin fara framvið, men bakkurin Jóhan Dahl steðgaði bóltinum, hugsaði um støðuna eina løtu og legði so bóltin í Sambandsmálið. Málmaðurin Kaj Leo Johannesen gjørdi sum kunnugt einki fyri at bjarga bóltinum.

Jóhan Dahl hevur fyri ári síðan sagt, at um stutta tíð eru flokkarnir báðir, Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin, búnir til at fara í samarbeiði saman.

Jóhan hevur góðar royndir av samarbeiðnum millum Tjóðveldis-, Javnaðar og Sambandsflokkin í Vági.

So spurningurin á aðalfundinum er um óhumskan í Vági skal staðfestast at vera galdandi fyri landið alt.

Eg skal enda við at endurgeva søgumanninn og samfelagskjakaran David Gress: "Mit livssyn er en kombination af et kristent og liberalt livssyn. Vi kan ikke nøjes med en liberalisme, der kun fokuserer på menneskelige, materielle og økonomiske sider, for mennesket er mere end det. Jeg er liberalist, fordi jeg ser friheden som en kvalitet i ethvert samfund, og i livet i det hele taget, men det er vigtigt, at denne frihedstænkning udfyldes med en åndelig dimension. Når liberalismen bliver gjort til blot mere eller mindre rådighed over sine penge, bliver det for mig en karikatur af liberalismen. Vi er nødt til at gå dybere med tingene: Økonomi er vigtig, men hvorfor? Hvis vi ikke har den åndlige dimension med, så ender vi i en tyrannisk ideologi."

Omanfyrinevnda endurgeving av D.G. er í tráð við sambandsfólk, soleiðis sum eg lærdi tey at kenna frá barni av.

Verður tyranniið staðfest við at velja Jóhan Dahl í leiðslu floksins, so er flokkurin har sum Javnaðar- og Tjóðveldisflokkurin eru frammanundan.

Har verður flokkurin, sum frálíður, stóri taparin.

# Fjøltáttað og førleikagevandi øki úti um landið

JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður



Útróðurin hevur fyri mong pláss í Føroyum ómetaligan týdning, men Kári P. Højgaard má sum onnur gera sær greitt, at neyðugt er við sterkum savnaðum økjum, við einum samfelagi við vinnu, mentan, og almennum stovnum nærri borgarunum.

Í Dimmalætting 20. mars, spyr Kári P. Højgaard, løgtingsmaður: "Hvat sigur løgmaður" og vísir til brævið, sum 13 landspolitikarar sendu løgmanni við uppskoti um, at hann setur skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk við tveimum tingmonnum úr hvørjum samgonguflokki, sum hevur til endmáls, innan 3 mánaðir at hava eitt yvirlit yvir støðuna av almennum stovnum, og hvørjar møguleiki er at flyta út um landið.

Eg fari ikki at koma inn á tað, Kári insinuerar politiskt, men heldur við nøkrum praktiskum viðmerkingum, har eg haldi, at hann er í so grunnur í sínum metingum av, hvat mennir økini úti um landið.

Hann hevur rætt í, at útróðurin hevur havt, hevur og eisini kemur at hava stóran týdning fyri mong pláss í Føroyum t.d. Eysturoynna, Hvannasund og Klaksvík og vit hoyrdu fyri kortum, at Fiskavirking fer undir átak í Havnini ið gevur útróðrarmonnum betri sømdir.

**Menning krevur víðfevndar fasilitetir**

Kári P. Højgaard má gera greitt, at neyðugt er eisini við øðrum víðfevndum tænastu-tættum, um økini skulu hava lívið lagað.

Skulu vit menna økini er neyðugt við meiri víðskygni, tí komandi ættarliðið, bæði her heima og sum hevur nomið sær bókliga útbúgving í øðrum londum, skulu hava arbeiði at koma til bæðið kvinna og maður, hesi fáa ikki førleikagevandi arbeiði, um ikki, økini eru savnað, styrkt og hava nútíðar fasilitetir. Hesi seta krøv til trivna.

Vit, sum sendu brævið til løgmann eru greiðir yvir, at um hetta mál ikki verður framt við skili, kemur tað upp í einki. Ein virðilig loysn á viðkvomum máli!

**Hermann og Kári hava onga loysn**

At seta arbeiðsbólk við tveimum limum úr hvørjum samgonguflokki geva Kára P. Højgaard og Hermann Oskarsson lítið fyri. Her eri eg ósamdur. Eg fari at gera greitt, at tá løgmaður setur henda bólk av politikarum, og løgmaður hevur nú málið, sum hann hevur biðið um, tekur bólkurin sjálvandi inn serkøna hjálp.Hetta er skjót, góð og praktisk loysn. Við loysnini hjá Kára og Hermanni, sum ikki er nøkur loysn, verður málið bert parkerað. Tað er frammundan dømt til at miseydnast. Hetta er roynt fyrr.

Kári P. Højgaard, løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin fer við grein síni skeivur og metir ov grunt um støðuna úti um landið. Hann eigur at hugsa um størri og sterkari øki við meiri fjøltáttaðum virkisøkjum. Tí uttan okkara loysn verður eingin trivnaður og eingin mennandi dynamykkur.

